# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Løgmaður í verjustøðu

Løgmaður hevur tikið til pennin til tess at bera í bøtuflaka fyri avgerðina um yvirtøku av fíggjareftirlitiunm og sigur fjáltur vera komnan á bankarnar og á Sambandsflokkin. Hann vissar tey ivandi um, at landsstýrið fer ikki at taka nøkur óráð, ið kunnu skaða bankarnar ella okkum sjálvi. Løgmaður verjir avgerðina um yvirtøku við at vísa til altjóðagerðina og vil vera við, at yvirtøkan er ein fortreyt fyri, at vit skulu kunnu megna tær avbjóðingar altjóðagerðin ber í fangi. Allir flokkar hava lagt stóran dent á týdningin av, at vit gerast partur av altjóðagerðini. At fíggjarstovnarnir nú reka størri virksemi uttan fyri landoddarnar fegnast vit um. Hetta er eisini fyritreyt fyri, at vit kunnu hava vøkstur í samfelagnum. Ein avbyrging førir til undirgang, ein upplating er vegurin fram. Hann vil vera við, at yvirtøkan fer at lætta um samráðingarnar við EFTA og fara at slætta vegin fyri eini betri avtalu við ES.

Tað er náttúrligt, at løgmaður verjir eina politiska avgerð, ið stórur ivi er um í samfelagnum. Tað eru tó ikki bara peningastovnar og sambandsmenn, ið eru í iva, hvørt her er talan um skilagóða avgerð. Tað er heldur ikki so løgið, tí føroyingar hava brent seg fleiri ferðir, og tað er ikki nóg mikið at geva danska fíggjareftirlitinum skyldina. Tað var ikki danska fíggjareftirlitið, ið hongdi milliardaveðhald um hálsin á føroyingum, men tríeindin løgting, landsstýri og bankarnir. Danir ávaraðu til fánýtis, og ørskapurin helt fram til alt rapaði, og danir so eftirfylgjandi fingu skyldina fyri ábyrgdarloysið í sjeyti- og áttatiárunum. Um løgmaður er sannførdur um, at eitt yvirtikið og føroyskt fíggjareftirlit hevði havt forðað øllum tí ræðuliga, ið hendi tá. má hann koma við meira ítøkiligum próvførslum. Er samgongan sannførd um, at henda yvirtøka er sjálv fortreytin fyri at gagnnýta altjóðagerðina, so má løgmaður vera meira ítøkiligur, um hann skal sannføra ein ivandi almenning um tað skilagóða og neyðuga í hesi yvirtøku.

Spurningurin er, um hetta eydnast løgmanni. Vit loyva okkum at ivast. Løgmaður er ikki nóg ítøkiligur og tí verður hann ikki nóg sannførandi í síni argumentatión. Hann málber seg í yvirskriftum, sum var talan um eina valgrein og ikki um ein tekst, ið er ætlaður at sissa tey fjálturstungnu í einum álvarsomum máli. Hendan yvirtøkan gevur meining, sigur løgmaður. Tað vóna vit so sanniliga, at allar yvirtøkur gera og taka sum givið, at eingin fremur yvirtøkur bert fyri at yvirtaka. Vit hava stuðlað allar yvirtøkur, ið eru framdar undir verandi stjórnarskipan. Tað er rætt at halda fram við sjálvstýristilgongdini, ið krevur, at vit støðugt fremja yvirtøkur. Skapar ein yvirtøka so stóran iva, ið hendan ger, so má grundgevast væl og virðiliga, sakliga og ítøkiliga fyri henni. Tað er ivasamt, um hetta er eydnast løgmanni.

**Sosialurin**

## Tíðindaskriv viðvíkjandi Napoleon



**BRANDUR JACOBSEN**
stjóri
P/F Kongshavnar Útgerðarfelag

**Í samband við tað nógvu umrøðu skipið Napoléon fyrrverandi Ocean Castle og núverandi Fríðborg hevur fingið í fjølmiðlunum og á Føroya Løgtingi, skal táverandi eigarin P/F Kongshavnar Útgerðarfelag koma við hesum rættleiðingum og upplýsingum:**

Tórbjørn Jacobsen hvørki stendur ella ábyrgist fyri nøkrum láni til landskassan, sum hevur tilknýtið til M/tr Napoleon ella P/F Kongshavnar Útgerðarfelag.

Tórbjørn Jacobsen átti upprunaliga 49,95 % av partapeninginum í P/F Kongshavnar Útgerðarfelag og eigur í dag 24,98 % av partapeninginum í hesum sama felag.

P/F Kongshavnar Útgerðarfelag yvirtók (arvaði) eitt landskassalán í skipinum Ocean Castle, í samband við keypið av skipinum í 2001, 4 ár eftir almennu saneringslógina. Táverandi eigarar, P/F Borgarfelli og P/F Slættafelli á Skála, høvdu tikið ella fingið hetta lán, tá skipið bleiv bygt á Skála Skipasmiðju í 1989.

Landskassalánið var í 1997, samsvarandi løgtingslóg, meðan fyrrverandi eigararnir áttu skipið, umlagt til eitt rentu- og avdráttarfrítt studningslán, sum varð niðurskrivað eftir ávísum áramáli samb. løgtingslóg nr. 26 frá 14 mars 1997. Eftir hesum leisti skuldi lánið vera burtur í 2012.

Skipið Napoléon varð eftir áheitan frá Føroya Sparikassa selt á tvingsilssølu í mars 2006. Søluprísurin var 30 mio. kr. Úrslitið var, at studningslánið, rentu- og avdráttarfrítt úr landskassanum, ikki fekk fulnað, soleiðis at P/F Kongshavnar Útgerðarfelag eftir øllum at døma framvegis stóð sum skuldari.

Tá skipið er selt, stendur lánið, framvegis í roknskapinum hjá felagnum sum eitt passiv. Hetta inniber, at felagið fær eina "tekniska" negativa egin-ogn. Fyri at rætta uppá hetta, soleiðis at felagið kundi yvirliva og ikki verða tvingsilsavtikið, verður tann 29. sept. 2006 søkt um loyvi at fáa flutt lánið til annað skip, sum felagið hevði í hyggju at útvega. Niðurskrivingin kundi á henda hátt halda áfram, samstundis sum felagið aftur kundi fáa eina positiva eginogn. Onki svar fyriliggur enn uppá hesa umsókn. Eftir sløk tvey ár hevur felagið onki svar fingið frá almenna myndugleikanum yvirhøvur, hvørki um umsøknin er móttikin ella viðgjørd. Júst hesin veruleikin er orsøkin til, at málið er vorðið eitt mál yvirhøvur. Vantandi málsviðgerðin, sum var sára einføld, annaðhvørt ja ella nei, er orsøkin til støðuna sum omanfyrinevnda partafelag er komið í ídag.

Tá felagið í alkendu rækjukreppuni, við arvaða almenna pantblokkinum sum í prinsippinum varð avskrivaður í 1997, kom í byrjandi fíggjarligar trupulleikar í 2004, var roynt at útvega neyðuga fígging til framhaldandi rakstur av skipinum. Fyrst setti felagið allan partapeningin, áljóðandi kr. 1 mio. í P/F Dagsbrún í veð fyri at økja um likviditetin. Tá hetta ikki røkk nóg langt til framhaldandi rakstur av skipinum var kannað, um felagið kundi fáa til vega rakstrarpening við at seta í veð partabrøvini í P/F Atlantic Petroleum, sum samanlagt taldu kr. 1.000.000,00. Tá tað ikki vísti seg at verða møguligt, helst tí bert fá høvdu álit á føroyska oljufelagnum um tað mundi, keyptu partaeigararnir Jóan Jacob Jacobsen og Tórbjørn Jacobsen hesi somu partabrøv í 2004 fyri áljóðandi virði kr. 1.000.000,00. og rindaðu peningin kontant inn í felagið, hetta fyri at útvega felagnum neyðugan likviditet.

Tá partabrøvini vóru keypt, var P/F Atlantic Petroleum ikki skrásett í keypsskálunum og ei heldur var nakar almennur kursur kendur fyri partabrøvini. Partaeigararnir kendu ongan almennan kurs ella prís fyri hesi partabrøv um hetta mundi og rindaðu sostatt sama keypspris, sum felagið hevði keypt tey fyri, tá oljufelagið varð stovnað.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddi:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.